## Góður toskaprísur

Nógvir danir halda fast um gamla siðin at eta tosk á nýggjárinum, men veðrið ger, at tað er ikki altíð líka lætt at fáa fatur á honum. Veðurmenninir hava boðað frá vindi í Norðsjónum, og tí verður tað helst bara toskur av teimum innaru leiðunum, sum verður í handlunum. Tað skerda útboðið ávirkar prísin. Í dag kom hann upp í 40 krónur á marknaðinum í Hvide Sande, men í handlunum kann hann koma upp í 130 krónur um vikuskiftið.



## Bryggjuquizz í Vestmanna

Í Vestmanna verður javnan skipað fyri sokallaðu bryggjuquizzi á caféini. Í kvøld verður aftur skipað fyri slíkum tiltaki. Tað eru teir báðir Marnar Joensen og Páll Hellu, ið skipa fyri bryggjuquizzinum, sum er ætlaður øllum áhugaðum omanfyri 18 ár. Tiltakið, sum verður á Café Bryggjan, byrjar klokkan 21. Aftan á verður skipað fyri dansi, har teir tríggir Annfinn Jacobsen, Gunnleif Bech og Johan Danielsen fara at spæla.



*Eyðun Johannesen, næstformaður og Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag í Norðurlandahúsinum í morgun*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Áhugin fyri sigling er alsamt minkandi



*- Vit hava onga viðmerking til sáttmálastríðið og vilja als ikki blanda okkum upp samráðingarnar millum Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag, sigur Eyðstein Djurhuus, formaður í Føroya Skipara-og Navigatørfelag, sum vit avmyndaðu í Norðurlandahúsinum í morgun*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Formaðurin í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Eyðstein Djurhuus, ásannar, at áhugin fyri sigling og fiskiskapi er alsamt minkandi, serliga millum tað yngra fólkið**

AÐALFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eins og Føroya Fiskimannafelag heldur landsfund, heldur eisini Føroya Skipara- og Navigatørfelag aðalfund í Norðurlandahúsinum í dag.

Í brævi, sum felagið hevur sent limum sínum undan aðalfundinum, leggur formaðurin, Eyðstein Djurhuus, dent á, hvussu umráðandi tað er, at so nógvir limir sum gjørligt møta á aðalfundi.

- Skal felagið veita limum sínum eina nóg góða tænastu, er neyðugt, at vit, sum mynda felagið, hoyra tykkara sjónarmið. Vit mugu hoyra tykkara sjónarmið um, hvørji mál felagið eigur at taka upp – ella gera meira við.

### Minkandi áhugi

Formaðurin segði í skrivinum, at hann í ársfrágreiðing felagsins á aðalfundinum í dag fer at viðgera øll viðkomandi viðurskifti fyri felagið.

- Áhugin fyri sigling og fiskiskapi er alsamt minkandi, serliga millum yngra fólkið. Miðalaldurin á sjófólki hækkar skjótt, og torført er at fáa manning til skipini. Nú hava fleiri skip ein part av manningini úr útlondum.

Eyðstein helt, at neyðugt er hjá felagnum at tosa innanhýsis um hetta álvarsmál.

Hann vísti á, at umstøðurnar til fundarvirksemi og prát eru sera góðar í Norðurlandahúsinum.

- Vit leggja fundin soleiðis til rættis, at høvi eisini verður hjá luttakarunum at práta saman um leyst og fast. Møguleiki er at hitta starvsfelagar og kenningar, sum tú annars bert hittir á whf'inum ella um fartelefonina, segði hann.

### Eingin uppíblanding

Tá ið Sosialurin var framvið í Norðurlandahúsinum í morgun, tosaðu vit tvey orð við Eyðstein Djurhuus, ið tók við sum formaður í Føroya Skipara-og Navigatørfelag eftir Ellint Abrahamsen.

Vit spurdu formannin, um hansara felag hevur nakrar viðmerkingar til verkfallið, sum er í fiskiskipaflotanum, tí Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag ikki kunnu semjast um nýggjan sáttmála.

- Nei, vit hava onga viðmerking til sáttmálastríðið og vilja als ikki blanda okkum upp samráðingarnar millum feløgini, sigur hann.

Í samrøðu við Sosialin hava bæði Føroya Reiðarafelag og Føroya Fiskimannafelag onkuntíð víst á, at yvirmannapartarnir kanska eru ov stórir. Kortini vil Føroya Fiskimannafelag ikki siga hetta alment, tí felagið sjálvsagt einki hevur ímóti, at aðrir starvsbólkar hava góðar treytir.

- Um yvirmannapartarnir eru ov stórir ella ov smáir, veldst um, hvussu tú sært upp á hetta, men tað er ein sannroynd, at hesir heldur eru minkaðir enn vaksnir, sum árini eru liðin, sigur Eyðstein Djurhuus í stuttari viðmerking.

Sosialurin og Portalurin fara at venda aftur til ymiskt av tí, sum formaðurin í Føroya Skipara-og Navigatørfelag segði á aðalfundinum í dag.

umfari, men tá ið vit hava fingið viðurskiftini í rættlag, verða vit væl fyri.

### Eingin hóttan...

Jan helt, at um fiskimenn ikki eru til reiðar at berjast fyri sínum rættindum, verða teir hildnir niðri í nógv ár, og hetta kann ikki verða rætt.

- Verða menn koyrdir í land, tí teir vísa til sáttmálan, fer tað at fáa álvarsligar avleiðingar. Vit noyðast at standa sum ein maður móti áganginum – ella verða vit misnýttir. Vit eiga ikki at verða bangnir fyri at leggja flotan – og tó. Hetta skal ikki verða nýtt sum nøkur hóttan, men takast í fullum álvara, segði Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag.



*Sámal Poulsen, sýsluformaður Føroya Fiskimannafelags í Suðuroy, er á veg á landsfund*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*